# Reno-Vent




*Reno-Vent selur at kalla alt, sum hevur við hita, vatn og sanitet at gera. Umfram hetta hava teir eisini landsins størsta úrval av hitapumpum*

Reno-Vent byrjaði í 1996 við sínum virksemi, og tá var fyritøkan í Havn. Reno-Vent hevur eisini verið inni á Skálafjørðin, men í 2003 flutti felagið til havnarlagið í Hósvík, og har hevur tað verið síðani.

Reno-Vent selur at kalla alt, sum hevur við hita, vatn og sanitet at gera, og í løtuni eru 16 fólk knýtt at fyritøkuni. Hesi hava úr at gera at kalla alt árið.

- Vit arbeiða í høvuðsheitum við hita, ventilatión og sanitet, og vit hava nógv at takast við, sigur stjórin á Reno-Vent, Hans Jákup Olsen.

- Vit eru í gongd við fleiri stórar verkætlanir í løtuni. Vit arbeiða m.a. inni í Runavíkar skúla, vit gera eina umbygging á landssjúkrahúsinum, og so eru vit eisini uppi á Tjarnargarði. Umframt hesar stóru verkætlanirnar arbeiða vit eisini við fleiri smærri verkætlanum, sigur Hans Jákup.

Reno-Vent hevur eisini landsins størsta úrval av hitapumpum, og síðsta árið hava teir selt rættiliga nógv av hesum. Teir hava selt serliga nógv av luft til luft hitapumpum, men síðstu tíðina hava teir eisini fingið gongd á søluna av bæði luft til vant hitapumpum og jørð hitapumpum.




















